### DAGSINS MEINING

# Studentaskúlin í vandasjógvi

Tað var ikki sørt skelkandi at hoyra í tinginum mánadagin, at støðan á Studentaskúlanum í Hoydølum er so vánalig, at vandi er fyri, at Arbeiðseftirlitið steingir skúlan um nakrar vikur, um ikki nakrar neyðugar ábøtur verða gjørdar.

Um hesar ábøturnar verða gjørdar nú, kom ikki fram, tá landsstýrismaðurin svaraði einum fyrispurningi frá einum løgtingsmanni, men skal skúlin ikki steingja, mugu tær fyrstu ábøturnar gerast.

Tá sagt verður fyrstu ábøturnar, er tað tí, at nógv skal gerast við skúlan, sum eisini hevur verið fyri vantandi viðlíkahaldi í kreppuárunum og í árunum eftir at kreppan hasaði av. Upplýst varð, at neyðugt er at brúka einar 13 milliónir krónur saman tey næstu tvey-trý árini.

Hesin peningur má fáast til vega, hóast samlaða upphæddin til ábøtur og viðlíkahald einans er stívliga tríggjar milliónir krónur fyri alt tað almenna.

Hóast hetta er ein sera lítil upphædd, kundi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki bara sær, men koma við viðmerkingini um, at bæði landsstýrismenn og løgtingsmenn altíð hava hugskot um at brúka pening, meðan verri er at koma við uppskotum um, hvussu kann sparast.

Tað virkaði sum landsstýrismaðurin kki skilur, at neyðugt er at halda viðlíka, um ikki ein stór rokning knappliga kemur undan kavi. Og tað er tað, sum hendi við Føroya Studentaskúla nú. Annars eigur hann eisini at hava í huga, at viðlíkahald merkir eisini arbeiði og kann eisini menna førleikakrøv hjá handverkarum og øðrum tænastuveitarum. Eisini er viðlíkahald í sjálvum sær.

Tá alt hetta er sagt, so skal helst eisini sigast, at tað er kanska gjørt í so lítið við at umvæla Studentaskúlan, tí útlit vóru fyri, at ein nýggjur skúladepil varð bygdur úti við Marknagilsvegin.

Men líkt er til, at henda ætlanin er fryst niður fyribils. Tí eigur málið um at umbyggja og umvæla skúlan í Hoydølum at takast uppaftur. Ein arkitektakapping um hesa ætlan er tøk, og spurningurin er, um henda ætlanin ikki er væl bíligari enn at byggja ein skúladepil í Marknagili, hóast hann hevur sínar fyrimunir, tá hugsað verður um eitt framtíðar skúlaumhvørvi.

Fráboðanin hjá Torbirni Jacobsen kom sum ein skelkur fyri fleiri tingfólk ígjár. Aftur eit dømi um, at landsstýrið goymir ella gloymir alt ov nógv mál, tí eitt annað kent mál stjelur ta nógvu orkuna.

**Sosialurin**

# Til minnis um okkara elskaðu dóttur, Súsonnu Hansen, Tvøroyri



Góða, elskaða Súsanna. Sárt er at fara undir at festa hesi orðini á blað, tí saknurin og sorgin eru so ófatulig.

Nú líður móti jólum, og tankarnir leita aftur til ta tíðina, tá ið tú enn vart okkara millum; vit pyntaðu, keyptu jólagávur, sungu jólasangir og jólasálmar, bakaðu og alt tað, sum hoyrir jólunum til.

Vit vóru einsamøll í 12 ár, og so komst tú sum ein gáva úr himlinum og broytti alt okkara lív. Takk fyri tey 20 árini, sum vit fingu saman við tær.

Og her sita vit so eftir, ribbað fyri alt, og báðir mammubeiggjarnir í Porkeri somuleiðis.

Tú vart okkara eitt og alt – okkara sólstrála – evnarík og hjálpsom. Vit minnast aftur á mangar góðar løtur. tú vildi fylgja tí lívsleið, sum vit, frá tí at tú vart heilt lítil, lærdu teg. Og sum tú mentist, búnaðist tað, ið var lagt niður í teg.

Nú vantaðu bert tríggir mánaðir í, so skuldi tú lætta flogið sum studentur.

Men so henda góðveðursmorgunin í mars broyttist alt! Tú strálaði sum ein sól, tá ið tú fór frá húsum, og tað seinasta, tú segði við mammu, var: »Endiliga ein sólskinsdagur. Eg skal njóta túrin suður!«

Tú náddi bert yvir undir kirkjugarðin í Líðini, so var lívstráðurin hart og brutalt avkvettur.

Tað var, sum um alt rapplaði rundan um okkum. Tíðin støðgaði, og vit blivu við at siga við okkum sjálvi: »Hetta kann ikki bera til! Hetta kann ikki passa!«

Men veruleikin var har. Sjálvan grækarismessudag, tá ið vit annars fagna tjaldrinum og várinum, vart tú borin til hvíldar skamt frá javnaldrum og vinum tínum Eyðuni, Álvi og Hávarði, sum vóru bornir oman hagar eitt hálvt ár frammanundan. Vit vita, at tit eru øll fýra saman nú.

Um jóansøkuleitið vóru floksfelagar tínir her úti og heilsaðu upp á okkum í teimum vøkru bláu troyggjunum og studentshúgvunum. Saman fóru vit so oman á grøvina og høvdu eina stilla løtu har niðri. Sárt var at síggja allan flokkin, og tú manglaði. Vit høvdu jú øll somul sæð fram ímóti hesum degi, sum skuldi havt verið ein gleðisdagur.

Hesir níggju mánaðirnir, síðani tú fórt frá okkum, hava verið svárir; men hin livandi vónin og vissan halda okkum uppi, tí vit nærkast tær fyri hvønn dag, sum fer. Minnini tala sítt lívsjáttandi mál.

Tøkk fái tit – vinir okkara her suðuri og familjan norðanfjørðs – sum hava staðið við okkara lið og stuðlað okkum. Uttan tykkara hjálpsemi hevði verið enn tyngri at komið ígjøgnum hetta.

Tað, sum tú saman við øðrum fórt undir inni í Missiónshúsinum, blómar í dag, hóast tað mangan sá vónleyst út tá. Soleiðis peikaði tú eisini skúlafeløgum tínum á Harran.

Slagorð títt – eg orki alt í Honum, sum ger meg sterkan – hevur eisini verið okkum til signingar.

Tær untist bert at liva eitt stutt lív, men ríkt var tað, og tú avrikaði nógv, tí tú livdi í lívssamfelagið við Hann, sum hevur alt valdið í himni og á jørð.

*Fyri framman ljósið lýsir*
*bjart*
*handan tær miklu lívsins*
*bylgjur.*
*Eg líti á, at tú meg sært.*
*Trygt mær heim til tín fylgir.*

Tað skrivliga, sum liggur eftir teg, sigur so nógv um tínar royndir í lívinum. Har ímillum eru nakrir sangir. Ørindið omanfyri er úr einum teirra.

Súsanna góða, tú skrivaði í minningarorðunum um Eyðun: Vit síggjast. Ja, stutt bleiv tykkara ímillum. Eyðun var hálvt ár yngri enn tú og fór hálvt ár undan tær. Og nú hvíla tit lið um lið har niðri undir Akursgerði. Vit vilja eisini minnast teg, góði Eyðun.

Tit vóru vinfólk bæði og stuðlaðu og gleddu hvørt annað. Vit – báðar familjurnar – eru altíð komin nógv saman, og tí gleddi tað okkum nógv, at navnið Súsanna kom at liva víðari í næsta ættarliðinum í tykkara familju.

Og nú fyri stuttum varð ein dóttur hjá einum systkinabarni hjá tær, Súsanna, doypt Eivør Súsanna, so at navnið livir eisini víðari okkara millum

Vit syrgja ikki sum tey, ið onga vón hava. Tú tekur sjálv soleiðis til í einum ørindi:

*O, eg gleði meg at sleppa í*
*havn,*
*tá aldri aftur eg skal syrgja.*
*Tú tekur meg inn í tín favn,*
*har eg tøkk tær skal syngja.*

Ella sum tú segði við eina kvinnu, sum tú komst til í dreymi: Eg eri bert deyð frá jarðarlívinum! Eg livi! Eg livi í ævinleikanum!

Súsanna góða! Ein dag stevna vit inn at tí himmalsku strondini fyri at verða saman við tær um allar ævir. Tá verður gleði!

**Vit møtast aftur**
**mamma og pabba**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga tykkum øllum, sum á so mangan hátt gleddu okkum á diamantbrúdleypsdegnum 14. november.

Gleðilig jól øll somul.

**Mia og Andrew Godtfred**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vil eg veita tykkum, sum mintust meg á sjeyti ára føðingardegi mínum tann 21. november.

Gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.

**Flemming Mikkelsen**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Bitin av Harry Potter

**Harry Potter fepurin hevur rakt Føroyar, um enn kanska í minni mun enn aðrastaðni. Barnabókin um tann ikki heilt vanliga smádrongin í London, Harry Potter, er seld í fleiri eintøkum enn nøkur onnur bók kring heimin. Tá tann eina Harry Potter bókin í røðini av fýra er lisin ber ikki til at steðga á, men hinar mugu eisini lesast, vilja næmingar á Studentaskúlanum á Kambsdali vera við. Flokkurin hevur júst lisið bókina á enskum**

HARRY POTTER
*Stefan í Skorini*

Bøkurnar hjá Joanne Kathleen Rowling um Harry Potter hava sett heimsmet, hvat sølu viðvíkur. Tær fýra bøkurnar eru seldar í fleiri enn 35 milliónum eintøkum kring heimin, og Harry Potter er týddur til 35 ymisk tungumál.

Rithøvundurin Rowling hevur fingið eini 500 milliónir dollarar frá søluni av Harry Potter. Hon líður onga fíggjarliga neyð fyribils.

Tá tann fjórða bókin í røðini varð útgivin fyri stuttum, varð hon prentað í 5,3 milliónum eintøkum. Hetta er eisini met fyri fyrsta upplag.

John Grisham og Stephen King kunnu bara fara heim at leggja seg, tí Rowling hevur langtsíðan lagt teir báðar fleiri bátslongdir afturum seg.

Alt er á gosi, hvørja ferð Rowling letur okkurt nýtt um Harry úr hondum, og Potter aldurnar hava ikki lagt seg enn. Tað fara tær heldur ikki tey næstu árini. Higartil eru fýra bøkur útgivnar, men enn eru tríggjar eftir, og um eitt lítið ár verður filmurin um Harry Potter væntandi at síggja.

Rowling sjálv væntar, at sjeynda og seinasta bókin verður tann, sum mest hóvasták fer at vera um.

Í Føroyum hava vit nú langt um leingi fingið ta fyrstu føroysku týðingina av Harry Potter. Gunnar Hoydal hevur týtt ta fyrstu bókina úr enskum, og hon kallast Harry Potter og vitramannasteinurin.

## Fangandi

"Harry Potter er fangandi" vóru flestu næmingarnir á einum máli um, tá tey skuldu geva sína hugsan um Harry Potter til kennar fyri tí útsenda av Sosialinum.

Vit sita í bleytum stólum úti í gongini í nýggja skúlanum á Kambsdali. Tá tú trínur inn í skúlan, gongur sjón fyri søgn, at tað er gjørligt at fáa ein skúla hugnaligan. Her er ikki tørvur á ábótum fyri sjey milliónir krónur sum aðrastaðni.

2.b á Studentaskúlanum á Kambsdali hevur lisið ensku barnabókina Harry Potter, sum verður givin upp til próvtøku.

Harry Potter hevur upptikið sinni teirra seinastu vikurnar. Eftir at hava lisið ta einu bókina er onkur av málsligu studentunum í 2.b vorðin heilt fangaður av søguni.

Friður fekst ikki í sinnið, og tey høvdu ikki góðan náttarsvøvn, fyrr enn tey høvdu lisið allar fýra bøkurnar um Harry.

– Hetta er ein rættiligur "pageturner", har tú alla tíðina verður noyddur at blaða og lesa næstu síðu, siga Harry fjepparararnir.

Tí hevur tað tikið nøkrum teirra bara heilt fáar dagar at lesa tær drúgvu Harry Potter bøkurnar.

Tey siga, at hvør kapittul endar soleiðis, at tú kennir teg noyddan at lesa tann næsta. Teir enda altíð við einum sokallaðum "cliffhanger".

Hetta er ein av dragandi eginleikunum, sum Rowling hevur fingið við í sínar bøkur.

Onnur eru eitt sindur meira ivingarsom, tá tey skulu meta um Harry.

– Hetta er eitt sindur for langt úti til so gamlar næmingar, halda tey.

Tey hava ilt við at finna nakra aðra góða orsøk til at lesa bøkurnar, enn at hon er partur at prøvtøkupensum hjá læreranum, og at tey kanska skulu greiða frá hesi bókini til munnliga próvtøku.

Tey flestu meta tó bókina at millum tær betru, sum tey hava lisið.

Bókin hevur eisini sína ávirkan á teir meira opnu næmingarnar, sum siga seg ganga og hugsa um Harry og hansara ævintýrferðir í gerandisdegnum. Hetta kann vera tí, tey bera eyga við onkran lut, sum minnir tey um Harry.

– Tað er neyðugt at loyva bókini at hava sína ávirkan fyri at ein kann fáa nakað burturúr at lesa, sigur ein eldhugaður næmingur.

Bøkurnar krevja eisini av lesaranum, at hann hevur hugflogið í lagi, tí annars kann bókin ikki geva tær nakað. Í Harry Potter eru flúgvandi bilar, livandi trøð og borðiskar, sum aldri tømast.

Næmingarnir halda tað vera dragandi, at ein kann kenna seg aftur í bókini, tí Harry er ein heilt vanligur drongur, sum tó hevur samband við ein ósjónligan gandaheim.

Hevur bókin um Harry Potter nakran lærdóm ella boðskap at siga lesaranum? Hvørji virði verður dentur lagdur á?

– Høvuðsboðskapurin er, at tú skalt ikki vera bangin fyri at gera tað, sum er rætt, hóast hetta gevur tær trupulleikar, og tú verður noyddur at bróta nakrar galdandi reglar og normar. Fyri at vera førur fyri hesum, er eisini neyðugt at hava álit á tær sjálvum

– Vinarlag hevur eisini ein stóran leiklut í bókini, Rowling undirstrikar týdningin av at ofra seg fyri vinir, siga studentarnir.

## Barnabók fyri vaksin

Søgan um Harry Potter er tann klassiska søgan, sum vit øll kenna. Tað góða ímóti tí ónda.

Harry er lítli smádrongurin úr London, sum í veruleikanum er gandakallur. Hetta varnast hann og fer á ein gandaskúla, sum ikki sæst í veruleikanum. Tað er her, bardagin móti tí ónda fyri tað mesta fer fram.

Voldemort, sum hevur tikið lívið av foreldrum Harrys, meðan hann enn var nýføðingur, stendur á odda fyri teimum óndu kreftunum. Størsti fíggindin hjá Harry er Voldemort.

Tað er við gandi, at Harry og Voldemort stríðast hvør móti øðrum. So er spurningurin, hvør ramastur er í gandi.

Vit kenna søguna aftur úr bókmentunum hjá øðrum enskum rithøvdundum sum C.S. Lewis og J.R.R. Tolkien, har tað góða berjist ímóti ónda. Eisini ber til at samanbera Harry Potter við Star Wars.

Harry Potter er ein barnabók, mest skrivað til børn, men hon kann sanniliga eisini lesast av vaksnum og hugtaka vaksin eins nógv um ikki meira enn børn. Hetta er ein av orsøkunum til, at hon er so vælumtókt um allan heim.

Rowling sigur, at hon skrivar bara út frá egnum barndómsminnum, og nakrar hendingar í bókini hava beinleiðis samband við onkra hending frá hennara barndómsdøgum.

## Mótmæli

Bókin hevur møtt mómælum frá fleiri konservativum bólkum, og serliga í USA er mótstøðan rættiliga hørð.

Sagt verður, at Rowling eggjar børnum at dyrka tað okkulta og djevulin.

Í fleiri enn seytjan amerikanskum statum verður av álvara roynt at steðga bókini, og hon er longu bannað í skúlum í Kansas og Colorado.

– Tað ber tó ikki til at banna hugflogi, siga næmingarnir.

Hví verða næmingar í 2. flokki á Studentaskúlanum so settir at lesa eina barnabók? Lærarin fær seinasta orðið.

– Eg vænti, at Harry Potter fer at verða eitt serstakt bókmentaligt fyribrigdi í okkara tíð, og tað er umráðandi hjá næmingunum at fáa við. Mær dámdi hana í øllum førum ómetaliga væl, sigur lærarin Birgitte Arendt, sum undirvísir næmingunum í enskum.



*Næmingar í 2.b á Studentaskúlanum á Kambsdali hava lisið Harry Potter, sum hevur tikið allan heimin á bóli. Tey vóru ójøvn á máli um dygdina á bókini, men Rowling hevur í øllum førum vunnið sær nakrar fjepparar í 2.b*

*Mynd: Stefan í Skorini*


